

# TVEY MARKNAÐARFÓLK TIL FT SAMSKIFTI

## Fremsta KST-fyritøka í Føroyum, Føroya Tele, er í stórari menning. Bæði í Føroyum og altjóða. Marknaðardeildin er ein av miðdeplunum í hesi menning, og nógvar spennandi uppgávur bíða eftir røttu starvsfólkunum.

Marknaðardeildin er partur av Sølu- og Marknaðardeplinum, har tilsamans 70 fólk starvast. 6 fólk eru tilknýtt Marknaðardeildini. Deildin hevur m.a. ábyrgd av marknaðarføring og innrætting í handlunum hjá Føroya Tele, marknaðarføringini hjá Vinnudeildini og flestu portalum og heimasíðum hjá Føroya Tele.

Vit sóknast eftir tveimum nýskapandi og kveikjandi fólkum.

Felags fyri størvini er, at nýggju starvsfólkini:
- Hugsa í "skeivum" vinklum
- Eru sosial og dáma at hava samband við nógv ymisk fólk
- Megna at hava nógvar bóltar í luftini í senn
- Eru nærløgd og samstarvsfús
- Eru von við samskipan og projektleiðslu
- Hava hugburðin, at ongin uppgáva er ov lítil, og ongin er ov stór
- Duga sera væl at málbera seg skrivliga á føroyskum og enskum

Nøkur dømi um arbeiðsuppgávur:
- Ábyrgd av marknaðarátøkum
- Nýtt innrættingarkonsept til handlarnar
- Endurnýggjan av øllum kundatilfari
- Endurnýggjan av sponsor- og stuðulspolitikki
- Ábyrgd av útgávu av Tráðinum (Blað hjá Føroya Tele)
- Projektleiðslu av útgávu av Telefonbókini

Vit vænta, at umsøkjarar hava viðkomandi útbúgving og hava stóran áhuga fyri marknaðarføring.

Umsøkjarar við royndum innan samskipan og projektleiðslu hava fyrimun.

Vit bjóða eitt starv við avbjóðingum og møguleikum fyri víðarimenning í einum framtakshugaðum umhvørvi.

Neyvari upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Annleyg Lamhauge, tel. 303315. Størvini verða lønt sambært avvarandi sáttmála. Umsóknir, CV og avrit av prógvum skulu verða Føroya Tele í hendi í seinasta lagi 21. apríl 2008 og skulu sendast til:

Føroya Tele
Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
FO-110 Tórshavn

FT Samskifti er dótturfelag í Føroya Tele. Í felagnum er øll kundarøkt, øll søla og alt samskifti við privat- og vinnukundar, alt GSM-samskifti og øll staðarútgerð fyri fastnettelefoni og breiðbandi. Í felagnum starvast 115 fólk. Tænastur frá FT Samskifti verða marknaðarførdar undir navninum Føroya Tele.

FØROYA TELE








## KIA Rio

Kia Rio varð í 2006 í eini stórari marknaðarkanning útnevndur sum tann bilurin, sum fægst feilir vóru við. Hann fæst við nógvari útgerð og hevur roynst ein avbera rakstrartryggur bilur. Rio hevur eisini ESP sum standardútgerð og alla aðra vanliga trygdarútgerð. Rio fæst m.a. við einum orkusparandi 1.4 litra motori við 97HK og við 5 hurðum. Nýtt snið av Kia Rio kemur í 2008.

**úr kr. 159.800**



**Kia Picanto** úr kr. 124.800



**Kia Magentis** úr kr. 224.800



**Kia Carens** úr kr. 256.800



**Kia Ceed** úr kr. 184.800



**Kia Sportage** úr kr. 270.800



**Kia Sorento** úr kr. 375.800

# Kia – millum heimsins fremstu bilaframleiðarar

Kia Motors hevur bygt sína egnu bilverksmiðju í Evropa og floymir nú yvir evropeiska marknaðin við rúkandi ferð. Talan er um eina bilverksmiðju, sum hevur stórar ætlanir í Evropa. Verksmiðjan er ein tann mest framkomna í øllum heiminum, og í 2007 tóku teir allan bilaídnaðin á bóli við at geva heilt upp til 7-ára garanti upp á sínar bilar. Málsetningurin hjá Kia Motors er heilt greiður. Teir skulu verða millum heimsins størstu bilframleiðararnar.

**Berg Motors Sp/F · Staravegur 1-3 · FO-110 Tórshavn · tel 31 35 35 · www.bergmotors.fo**